UTTAN ÚR HEIMI

## Gera kvetti av oljuni

Í fíggjarlógini í ár hevur norska stjórnin roknað við at fáa góðar 204 milliardir krónur burtur úr oljuni, men hetta tal er alt ov lágt.

Metingin hjá fíggjarmálaráðnum er grundað á, at oljuprísurin er 230 norskar krónur fyri tunnuna, men í seinastuni hevur prísurin ligið oman fyri 300 krónur fyri tunnuna. Heldur hesin prísurin sær, verða inntøkurnar hjá ríkinum góðar 52 milliardir krónur størri enn mett á fíggjarlógini, skrivar Aftenposten. Samstundis veksa skattainntøkurnar frá oljufeløgunum við umleið 27 milliardum krónum, men teir pengarnir koma ikki í ríkiskassan fyrr enn næsta ár.

Í hesari vikuni hevur prísurin á olju úr Norðsjónum verið oman fyri 360 norskar krónur fyri tunnuna, og verður tað varandi, kann tað geva norska ríkiskassanum nógv meiri, enn stjórnin metti, tá fíggjarlógin bleiv gjørd.

## Fleiri klaga

Alt fleiri danir kæra seg um, at tey hava ikki fingið ta røttu viðgerðina í heilsuverkinum, og at tey tí vilja hava endurgjald.

Í fjør fingu myndugleikarnir 1.100 fleiri klagur enn í 2003. 4.900 fólk kærdu seg um viðgerðina, og 43 prosent av teimum fingu viðhald, skrivar Politiken.. Í teimum flestu førunum fingu fólk viðhald, tí tey kundu havt fingið betri viðgerð, enn tey fingu, ella tí at fólk høvdu fingið skaða undir viðgerðini í heilsuverkinum.

Fyri einum ári síðani skipaðu myndugleikarnir fyri einum átaki við upplýsingum um, nær og hvussu fólk kunnu klaga um viðgerðina í heilsuverkinum, og hetta er ivaleyst orsøkin til, at klagurnar vóru so nógvar í fjør.

## Heldur Kina enn Taiwan

Tann katólski biskuppurin í Hongkong, Joseph Zen, vil vera við, at Vatikanið er til reiðar at kvetta sambandið við Taiwan og at taka upp samband við stýrið í Kina ístaðin fyri.

Við blaðið South China Morning Post sigur biskuppurin, at hetta var ein trupul avgerð hjá Vatikaninum, men at hon er tikin nú. Samstundis verður víst á, at kinesiska stjórnin sendi Vatikaninum samkenslufjarrit sunnudagin í sambandi við deyða pávans, og at samstundis søgdu kinesiskir embætismenn seg vóna at fáa betri viðurskiftið við pávasætið í Rom. Men treytin var, at Vatikanið kvettir sambandið við myndugleikarnar í Taiwan, løgdu teir afturat.

Hildið verður, at umleið átta milliónir katolikkar eru í Kina, og sambært biskuppinum í Hongkong fáa teir kinesisku katolikkarnir ikki størri frælsi, fyrr enn Vatikanið stovnar diplomatiskt samband við Kina.

## Eitt mistak

Amerikanska filmskvinnan Jane Fonda iðrar seg nú um, at hon lat seg avmynda saman við einari mynd av norðurvietnamsiskum loftverjukanónum í 1972. Myndin elvdi til øsing í USA, og nógvir amerikanarar høvdu hug at leggja filmskvinnuna undir landasvik.

Í dag sigur Jane Fonda, at myndin var eitt mistak, tí hon visti fullvæl, at norðurvietnamesar fóru at misbrúka myndina. Í samrøðu við sjónvarpið CBS um vikuskiftið segði hon, at hon sveik teir amerikonsku hermenninar, sum vóru í Vietnam, og tað landið, sum hevði givið henni so nógv gott. Men hon legði afturat, at so langt hugsaði hon ikki ta løtuna, myndin bleiv tikin.

Hinvegin iðrar Jane Fonda seg ikki um, at hon tók lut í tíggju sendingum hjá norðurvietnamesiska útvarpinum, har hon fanst at teimum amerikonsku bumbuálopunum á Norðurvietnam. Hon iðrar seg heldur ikki um, at hon mælti amerikonsku flogskiparunum til at rýma úr flogvápninum.

# Haider roynir aftur

**Tann víðgongdi eysturríkski høgrapolitikarin Jørg Haider hevur stovnað nýggjan flokk**

EYSTURRÍKI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Jørg Haider er aftur á veg upp í eysturríkskan politikk. Mánadagin fór hann burtur úr Frælsisflokkinum, sum hann sjálvur var við til at stovna, og samstundis kunngjørdi hann, at hann hevði stovnað flokkin Samgongan fyri Eysturríkis Framtíð. Á einum tíðindafundi boðaðu hann og systirin, Ursula Haubner, frá, at tann nýggi flokkurin ætlar sær at fáa fatur á teimum nógvu veljarunum, sum hava vent Frælsisflokkinum bakið tey seinastu árini.

Jørg Haider elvdi til rumbul í ES, tá Frælsisflokkurin fekk 27 prosent av atkvøðunum á tjóðartingsvalinum í Eysturríki í 1999 og kom upp í stjórnarsamgonguna. Undir valstríðnum hevði Jørg Haider róst hersetingarpolitikkinum hjá Nazitýsklandi, og tað gjørdi, at ES hevði hug at seta Eysturríki uttanfyri, tá Frælsisflokkurin kom upp í stjórnina.

Samgongan fyri Eysturríkis Framtíð hevur longu kravt nýval, og tað sama hava sosialdemokratarnir og Tey Grønu gjørt, men enn hevur Wolfgang Schüssel, kanslari, ikki latið við seg koma.

# Samd um at minnast pávan




*Viðhaldsfólkini hjá teimum báðum fótbóltsfeløgunum í polska býnum Krakow, Wizla Kraków og Cracovia, eru tiltikin harðrend, og tað hendir meiri enn so, at ófriður undir og aftan á dystir ímillum feløgini kostar mannalív. Men í sambandi við deyða pávans vóru viðhaldsfólkini samd um at minnast hann í felag. Sjálvur helt pávin við Cracowia á yngri árum*

*Mynd: Reuters*

# Bush samanborin við apur

**Belgiska løgreglan hevur brúkt myndir, sum samanbera amerikanska forsetan við eina apu**

BELGIA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Belgiski innanríkisráðharrin, Patrick Dawael, var fáorðaður, tá hann mánakvøldið skuldi greiða frá, hví løgreglan hevur brúkt myndir, sum bera amerikanska forsetan saman við eina apu.

– Eg havi ikki sæð hasar myndirnar fyrr, og eg haldi hatta vera ósømiligt, svaraði ráðharrin lágmæltur.

Tað var blaðið Het Laatste Nieuws, sum avdúkaði, at løgreglan hevði nýtt myndirnar sum lið í at læra løgreglumenn, hvussu umráðandi tað er hjá løgregluni at duga at tulka andlitsbragdið hjá fólki. Myndirnar vístu, hvussu andlitið á amerikanska forsetanum var, tá hann er hugsunarsamur, og hvussu tað broytist, tá hann heldur røðu ella tosar við fólk, og myndirnar vórðu so bornar saman við tilsvarandi myndir av apum.

Sambært fronsku tíðindastovuni AFP kann innanríkisráðharrin fáa trupulleikar av málinum, tí tað er komið fram, at hann hevur mælt løgregluni og øðrum myndugleikum til at brúka tilfarið.